# Samlagstrygging

## Lívstrygging

Við Samlagstrygging frá LÍV hevur tú møguleika at tryggja tíni avvarðandi fíggjarliga, um tú skuldi follið frá. Við lívstrygging verður ein upphædd útgoldin til tey, ið sita eftir, um tú doyrt, áðrenn tú nært fólkapensjónsaldri.

Flestu lívstryggingar verða í dag teknaðar sum samlagstrygging. Tað vil siga, at hesar tryggingar verða teknaðar í einum stórum felags bólki. Hetta gevur betri javnvág, tá hugsað verður um skaðagongd og prísáseting.

## Hvør kann tekna Samlagstrygging?

Allir kundar í Føroya Banka, ið eru millum 18 til og við 50 ár, kunnu tekna eina Samlagstrygging. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert arbeiðsfør/ur, frísk/ur og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Av tí at Samlagstrygging frá LÍV ikki ávirkar aðrar lívstryggingar, ber til at tekna hana, sjálvt um tú eisini hevur trygging aðrastaðni.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Tú kanst velja millum ymiskar tryggingarupphæddir. Upphæddin sum fellur til útgjaldingar við deyða, kann verða upp til kr. 1.700.000. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri Samlagstrygging og Restskuldartrygging ongantíð fara upp um kr. 3.000.000.

Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Tryggingarupphædd** | 575.000 Kr. | 800.000 Kr. | 1.150.000 kr. | 1.700.000 kr. |
| **Gjald um mánaðin** | 143,75 kr. | 197,71 kr. | 281,75 kr. | 413,67 kr. |

## Útgjald

Tú kanst velja millum ymiskar tryggingarupphæddir. Upphæddin sum fellur til útgjaldingar við deyða, kann verða upp til kr. 1.700.000. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri Samlagstrygging og Restskuldartrygging ongantíð fara upp um kr. 3.000.000.
Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.